# Vindurin spilti veitsluna

**Leygardagurin á Summar Festivalinum skuldi eftir ætlan verið ein stór veitsla við nøkrum av teimum allar bestu føroysku tónleikanøvnum og stórum útlendskum nøvnum sum Kim Wilde, Bryan Rice og Amy Diamond. Men áðrenn veitslan veruliga kom í gongd gjørdist vindurin so ógvisligur, at festivalurin avlýsti endabrakið.**

SUMMARFESTIVAL
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



*Steintór Rasmussen og hinir fyrireikararnir tóku avgerðina um at steðga festivalinum í samráð við myndugleikarnar*
*Mynd: Jens Kr. Van*

Amy Diamond gjørdist síðsta navn, ið spældi á metstóra pallinum á Vágsbøi. Tá unga norska poppstjørnan fór av pallinum, varð avgerð tikin um, at vindurin var ov nógvur at halda fram. Vindurin lá beint inn í pallin. Hóast talan var um ein stóran og tungan pall, virkaði dúkurin sum eitt segl. Tí varð mett, at trygt var ikki at halda fram.

Meðan Petur Háberg fór á pallin í FLAGS-teltinum, varð avgerð tikin um, eisini at lata lítla uttandurða pallin á torginum aftur.

Boðað var frá, at tiltakið helt fram við nýggjari skerdari skrá í FLAGS-teltinum og í KÍ-høllini. M.a var ætlanin, at Kim Wilde skuldi á pall í KÍ-høllini, og at Bryan Rice skuldi á pall í FLAGS-teltinum.

### Hvirla tók matteltið

Men áðrenn broytta skráin fór av bakkastokkið, hetta var umleið klokkan 18, tók ein ógvislig hvirla stóra mat- og skeinkiteltið, ið var sett upp á vegnum við Vágsbø. Hóast fólk var í teltinum og á økinum framman fyri tað, fingu hesi bert smávegis snuddir.

Eitt nú breyt ein kameramaður hjá Sjónvarpinum eitt rivjabein, men flest øll sluppu við skelkinum. Vágsbøur sá øgiligur út, við restum av teltinum, búffum, pizzaeskjum og nógvum øðrum óruddi.

Fyrireikararnir søgdu, at hvirlan, ið tók teltið, kom heilt óvart á teir.

- Vit hava havt samband við veðurmenn allan dag og hava fingið at vita, at vit kundu rokna við upp til 18 metur um sekundi, og tað átti teltið at hildið til. Men handan hvirlan var munandi harðari enn tað, segði Steintór Rasmussen við Sosialin beint eftir hendingina. Vindmátingar vístu, at hvirlurnar vóru upp til 49 metrar um sekundið tað einu løtuna.

### FLAGS-teltið flaksaði

Steintór vísti á, at FLAGS-teltið var fest heilt øðrvísið enn mat- og skeinkiteltið, tí varð avgjørt at halda fram í KÍ-høllini og FLAGS-teltinum. Løtu seinni fór Bryan Rice á pallin, men eftir fýra løg varð avgerð tikin um at steðga konsertini, og fáa fólk úr FLAGS-teltinum, ið var farið at flaksa dekan ov illa. Við einans KÍ-høllini eftir, og einum hægsta marki av 800 gestum í høllini í senn, valdi festivalleiðslan síðan at steðga festivalinum.

### Vónbrotin fyrireikari

Steintór Rasmussen, var ein vónbrotin maður, tá vit fingu orð á hann, eftir at boðini, um at festivalurin var steðgaður, bórust.

- Tað kennist svárt at skula gevast nú. Vit høvdu eina kanónskrá í kvøld, ikki minst tann føroyski parturin, haldi eg sjálvur. Hetta er ein øgiligur missur, sjálvandi hjá okkum, men eisini hjá teimum nógvu, sum gleddu seg til kvøldið. Hetta er øgiliga keðiligt, eisini eftir, at hini kvøldini eydnaðust so væl, og fólk hevði bakkað so væl upp um okkum. Men eftir, at vit máttu lata FLAGS-teltið aftur, var ikki ráðiligt at halda fram. Vit høvdu ætla at býtt fólkið millum FLAGS-teltið og høllina, men høllin tekur einans 800 fólk, og tað kunnu vit ikki bjóða fólki. Tað er betur at gevast, um man ikki hevur nakað veruligt at bjóða fólki, segði Steintór.

Steintór greiddi frá, at avgerðin at gevast var tikin í samráð bjargingarfelagið og hinar avvarðandi myndugleikarnar.

Hann segði at enda, at hann var glaður um, at eingin álvarsligur fólkaskaðið var hendur av vindinum, og vísti á, at eingin kundi spátt um, at vit fingu ódn fyrsta vikuskiftið í august.

# Gott lag handan pallin

**Tónleikarar, áhoyrarar og fyriskiparar eru ørkymlaðir á Summarfestivalinum. Tríggir pallar eru nú tiknir niður, og KÍ Høllin er við at verða riggað til, so konsertir kunnu vera har í staðin.**

SUMMARFESTIVAL
*Dánjal Hoydal*
*planet@sosialurin.fo*

Sosialurin var handan pallin á Summarfestivalinum, back stage í Atlantis, seinnapartin leygardagin, tá útipallarnir vóru latnir aftur, har sótu tónleikarar og bíðaðu eftir boðum. Hóast óvissuna, vóru tey ikki ónøgd. Øll skiltu, at umstøðurnar vóru heilt óvanligar, og at fyrireikararnir tí máttu taka neyðugu stigini.

- Tað er sjálvandi keðiligt, at eg ikki sleppi at spæla. Men sjálvandi mugu fyrireikararnir taka útlendsku gestirnar framum. Tey eru komin higar við flogfari, og áhoyrararnir eru komnir fyri at hoyra tey. Okkum føroyingar kunnu tey hoyra eina aðra ferð, segði ein positiv Jensina Olsen, júst eftir at hon hevði frætt, at hennara konsert var avlýst.

- Her er sera gott skil í. Vit hava fingið kontraktir frammanundan, so tí er ongin, sum verður ótryggur av hesum her. Øll eru sera positiv og taka tað pent. Tey flenna bara og taka tað, sum tað kemur, segði hon.

Lagið handan pallin var fint, og í staðin fyri at spæla fingu tónleikararnar sær ein bita, ein kaffimunn ella eina øl.